# Dramatikkur til ta stóru gullmedaljuna

**Føroysku fótbóltskvinnurnar vunnu eina dramatiska, málríka og til tíðir væl spælda finalu móti Álandi, hóast tær tríggjar ferðir vóru aftan fyri, og máttu spæla seinasta hálva tíman við tíggju gentum á vøllinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen – Isle of Man*



Tað var ein skelkandi byrjan, sum føroysku kvinnurnar fingu, tá tær fríggjamorgunin spældu finaludyst á Oyggjaleikum.

Fram til finaluna hevði bólturin ongan tíð verið í føroysku meskunum, men tað tók bert Marinu Mörn tveir minuttir at oyðileggja vøkru hagtølini. Dysturin var ikki meira enn byrjaður, tá ein long sending varð løgd inn um føroysku verjuna, og har kundi Marina renna seg púra leysa og smekka bóltin í føroysku meskarnar.

Løtu seinni kundi og áttu Føroyar helst at javna, men álendski málverjin bjargaði skotinum frá Eyðvør.

## Mistak kostaði aftur

Tað eydnaðist tó okkara at javna leiðsluna fáar minuttir seinni. Eftir at hava móttikið bóltin frá Oddvá Kristinsdóttir, setti Sólvá Joensen fer á frá miðvøllinum, áðrenn hon slepti til Helgu, sum einsamøll við málverjanum kundi leggja bóltin til rættis í meskunum.

Ein skuldi hildið, at føroysku genturnar vóru ávaraðar eftir álendska leiðslumálið, men løtuna eftir útjavningina góvu tær aftur mótstøðuliðnum eina gávu. bólturin varð ikki ruddaður nóg væl burtur, men endaði ístaðin hjá Ing-Mari Holmberg. Úr 16 metrum smekkaði hon til, og í einum bleytum boga sigldi bólturin yvir á handaru stong, haðani hann datt inn um strikuna.

Beint eftir hetta mundi gingið heilt galið, tá okkara aftur sløsaðu afturi í verjuni. Vandamikla Marina Mörn vann sær bóltin, og slapp eisini inn um Anniku í málinum, men lukkutíð heilkiksaði hon, tá hon skuldi senda bóltin í málið.

## Trýstið gav úrslit

Restina av hálvleikinum royndu føroysku kvinnurnar at trýsta, men verjan hjá Álandi helt, soleiðis at talan ongan tíð gjørdist um teir heilt stóru møguleikarnar.

Sama gongdin helt fram í seinna hálvleiki. Einar tvær ferðir bjargaði álendski málverjin sera væl, tá okkara royndu seg.

Í royndunum at javna fluttu okkara seg alt longur niðan á mótstøðuhálvuni, og so hendi tað, sum ikki má henda, men sum so ofta hendir í slíkum førum. Áland skoraði.
Málið var kanska heldur tilvildarligt, og kanska var hond á, tá eitt føroysk spark úr verjuni varð blokkað. Úrslitið varð undir øllum umstøðum, at Ing-Mari Holmberg enn eina ferð gjørdist leys, og tá Annika var komin dekan ov langt úr málinum, varð bólturin enn eina ferð sendir upp um hana.

Nú var bert eitt at gera hjá okkara, og tað var at satsa alt seinastu hálva hálvleikin. Tað gjørdu tær eisini, og tjúgu minuttir fyri leiklok, gav hetta endiliga úrslit. Rannvá fekk fatur á leysum bólti uttan fyri brotsteigin, og eftir at hava snarað ein mótstøðuleikara av sær, smekkaði hon til uttan møguleika hjá málverjanum. Nakað seinni hevði Rannvá stóran møguleika at javna, men hesa ferð varð skotið beint upp um málið.

Hetta tók tó ikki mótið frá henni, og løtu seinni sendi hon inn fyri úr vinstru, har Eyðvør púra leys kundi skalla eina uppiborna útjavnan heim.

## Hondbóltsspæl

Hondbóltsspælið hjá álendingum helt tó fram, og málið til 4-3 var meinlíkt tí, sum tær komu á 3-1 við. Bólturin varð blokkaður við hondini, tá Ragna sparkaði burtur, og so kundi Marina Mörn skora til 4-3.

Føroyuingar góvu tó ikki upp, og í næst seinasta minuttinum kundi Helga skora til 4-4 eftir frísparksinnlegg, sum hon at enda taklaði inn í málið. Dramatikkurin var tó ikki liðugur. Í seinasa mkinuttinum klossaði Annika, tá hon fór út eftir eini langari álendskari sending. Úrslitið varð, at Marina Mörn gjørdist leys, og tá Ragna mátti nýta hondina at verja við, var reytt kort og brotsspark. Hetta sendi Ing-Mari Holmberg tó á stólpan, so avgerðin varð útsett til longda leiktíð.

Við tíggju gentum á vøllinum eydnaðist tað kortini føroysku gentunum at vinna, og endin av dystinum var virðigur at vera partur av eini stórari finalu. Helga sendi innfyri úr vinstru, har Malena var fyrst á, og í tveimum royndum fekk hon skumpað bóltin inn um málverjan.

Dysturin var ikki lokin, men hóast tað stóð nógv á móti endanum, so eydnaðist tað kortini at halda tætt, og soleiðis varð tíggjunda føroyska heiðursmerkið á oyggjaleikunum tryggjað.

**Føroyar-Áland**
0-1: Marina Mörn 2
1-1: Helga Ellingsgaard 9
1-2: Ing-Mari Holmberg 12
1-3: Ing-Mari Holmberg 61
2-3: Rannvá Andreasen 70
3-3: Eyðvør úr Dímun 77
3-4: Marina Mörn 79

# Dupult gull til Marit

**Marit Magnussen vann sær tvey gullmerki, tá bundna kappingin í kvinnufimleiki var á skránni fríggjamorgunin**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Fríggjadagin eydnaðist tað hjá Marit Magnussen at vinna gullið, sum hon ikki fekk, tá fría kappingin var á gólvinum mikudagin. Ta ferðina datt hon í eini seriu, sum hon seinastu tveir mánaðirnir hevur vant at kalla uttan mistøk, so einki er at ivast í, at hon var ovurfegin, tá hon fríggjadagin hevði ikki minni enn trý heiðursmerki um hálsin.

Tað var nenvliga ikki bert á gólvinum, at Marit stóð seg væl. Umframt gullið í sínari favoritt grein, vann hon eisini silvur í lopi, og samanlagt var hetta nóg mikið til at tryggja sær gull í samlaðu kappingini. Eitt gullmerki, sum hon átti saman við einari gentu av Isle of Man.

- Beint eftir, at hon hevði fingið heiðursmerkini um hálsin, hittu vit Marit, og sum vera man, var hon ovurfegin um hetta.

- Mikudagin datt eg eitt gullmerki burtur, so á ein hátt, er hetta eitt gott plástur á sárið. Tað gjørdi tað so ikki verri, at eisini vann gull samanlagt. Hóast eg plagi at standa meg hampuliga væl í lopi, so hevði eg avgjørt ikki roknað við tí, segði Marit at enda.

*Hetta var eitt plástur á sárið, segði Marit um gullið, sum hon nú vann í bundnu kappingini*





Føroyar-Saaremaa 0-3 (19-25, 11-25)

# Endurtøka

**Dysturin um fjórða plássi móti Saaremaa endaði eins og dysturin í bólkaspælinum gjørdi. Føroyar taptu greitt 0-3**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Wight*

Tað mundi koma sera illa við hjá føroysku flogbóltsmonnunum, tá tað eydnaðist Álandi at vinna á Saaremaa í hálvfinaluni. Tá Føroyar samstundis taptu 3-1 í sínari hálvfinalu merkti hetta, at mótstøðuliðið í bronsudystinum aftur gjørdist Saaremaa, og tað er eingin loyna, at hetta ikki hóskaði føroyingunum serliga væl.

Føroysku menninir hava nevnliga ongan tíð vunnið á Saareema í Oyggjaleikahøpi, og dysturin hesa ferð gjørdist heldur einki undantak í so máta.

## Einki at rafla um

Sum heild varð talan um ein rættiliga tryggan sigur til Saaremaa. Agressiva spæl teirra hóskaði als ikki til okkara, og hóast vit komu hampuliga nær í onkrum setti, so var samlaði sigurin ongan tíð í vanda.

Sostatt endaði luttøkan hjá monnunum hbesa ferð uttan heiðursmerki, men sjálvt um hetta í sjálvum sær er harmuligt, so vóru tó fleiri positiv element í føroysku luttøkuni.

Tað varð sagt undan kappingini, og tað er eisini ein veruleiki, at nógvir ungir leikarar hesa ferð fingu møguleikan. Um tvey ár hava hesir fingið tað pettið eyka av royndum, sum ger, at teir megna at halda dampinum uppi ígjøgnum ein heilan dyst, og ikki – sum í hálvfinaluni móti Gotlandi – spæla nakrar fantastiskar bóltar, fyri síðani at geva tvey ella trý stig púra óneyðugt frá sær.

Stabilitetur er lyklaorðið í hesum sambandi, og verður hetta fingið í rættlag, er lítið at ivast í, at talan kann gerast um heiðursmerki um tvey ár.




*Saaremaa vísti seg enn eina ferð at vera ov sterkt fyri føroyingar, sum tí máttu taka til takkar við fjórða plássinum*

# Gullið kom heim í dramatiskum dysti



**Føroysku flogbóltskvinnurnar vunnu 3-2 í finaluni á Saremaa í dramatiskum dysti. Eftir ein niðurtúr miðskeiðis í dystinum vunnu føroyingar fimta settið, og sostatt varð gullið endurvunnið**

FLOGBÓLTUR
*Heini í Skorini*

Føroyingar fingu góða byrjan, og tær vóru á odda 3-0 í fyrsta setti beinanvegin í dystinum. Serliga góvu servurnar hjá Alvildu Ólavsdóttir mótstøðuliðnum trupulleikar.

Síðani gjørdist javnari miðskeiðis í settinum, men føroysku kvinnurnar megnaðu aftur at leggja luft millum seg og Saremaa, og føroyingar vunnu settið sannførandi 21-15. Sera góð byrjan hjá føroysku kvinnunum.

Í øðrum settið helt góða spælið hjá føroyingum á, og tær vóru á odda 8-3 áðrenn langt var umliðið. Eftir hetta tóktist trupult hjá Saremaa at koma innaftur í næsta settið, og føroysku kvinnurnar høvdu greiða yvirvág. Tær koyrdu eisini næsta settið heim, og tær vunnu heili 25-16. Sostatt sá út til, at kvinnurnar stevndu móti at endurvinna gullið fyri tveimum árum síðani. Føroyska spælið hevði stutt sagt verið sera gott, og ikki var líkt til, at Saremaa hevði møguleika at koma innaftur í dystin.

## Komu í ein aldudal

Men kvinnurnar úr Saremaa vóru hamskiftar, tá byrjað varð uppá triðja settið. Áðrenn føroyingar fingu gongd á spælið, var støðan 7-1 til Saremaa, og nógvir feilir vóru at síggja á føroysku liðnum. Men eftir time-out og rætting uppá mistøkini komu okkara kvinnur aftur eftir niðurtúrin fyrst í settinum. Men kvinnurnar komu innaftur í ein aldudal, og spælið var óstøðugt. Kvinnnurnar hjá okkum vóru aftanfyri 22-14, og endaliga úrslitið í triðja setti var 25-18 til Saremaa. Sera stórur munur á spælinum hjá føroyingum frá fyrsta og øðrum settið samanborið við triðja sett.

## Máttu út í fimta sett

Fjórða settið var sera javnt, men Saremaa hevði eins og í triðja settið yvirvág. Tá støðan var 16-10 til Saremaa, varð time-out, og føroysku kvinnurnar skuldu nú finna ein hátt at koma inn aftur í dystin. Føroyar tók seg spakuliga inn á Saremaa, og eitt skifti var 21-17 til Saremaa. Føroysku kvinnurnar megnaðu tó ikki at vinna settið og harvið dystin, og Saremaa vann settið 25-18.

Nú var neyðugt at fara út í fimta og avgerandi settið, og finalan á Oyggjaleikunum í kvinnuflogbólti 2001 skuldi avgerast við hesum setti.

## Sigurin kom heim

Eftir javna byrjan fekk Føroyar spælið at rigga, og blokkurin og álopsspælið kom veruliga í gongd. Tað var júst hetta, sum ikki hevði riggað í 2. og 3. settið. Frá at vera frammanfyri 9-8 komu tær upp á heili 14-8, og so høvdu føroysku kvinnurnar heili seks matcbóltar. Fyrsti matchbólturin var ein serva sum bleiv ov long, men í næsta bóltinum sveik føroyska manningin ikki, og sostatt var gullið veruleiki. Føroyingar fingu endurreisn eftir tvey vánalig sett, og við trimum settum móti tveimum hava føroysku flogbóltkvinnurnar vunnið gull á Oyggjaleikunum á Man 2001.